21-06-99

# VÍSINDASTØRV Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA

Vísindastarvsfólk á setrinum eru professarar, lektarar, adjunktar og granskingarstipendiatar.

Professara- og lektarastørv eru føst størv, og adjunkt- og granskingarstipendiat-størv eru útbúgvingarstørv, sum eru tíðaravmarkað. Granskingin hjá vísindastarvsfólki skal fara fram á tí øki, sum er ásett fyri deildina, har vísindastarvsfólkið er sett í starv.

Fasta vísindastarvsliðið umfatar adjunktar, lektarar og professarar. Uttanseturslærarar eru uttanseturslektarar og uttansetursprofessarar.

## ÚTBÚGVINGARSTØRV

**Adjunktstørv** eru 4-ára størv, sum eftir umsókn kunnu leingjast við 1 ári. Um adjunktur heldur seg lúka treytirnar fyri lektarastøðu, kann hann søkja um at verða fluttur fram í lektarastarv.

Tey, sum kunnu fáa adjunktstøðu, hava lokið kandidatprógv, sum vanliga ikki er eldri enn umleið 6 ár, og hava undirvísingarførleika. Umsøkjarin skal harafturat skjalprógva, at hann hevur góð granskingarevni.

Arbeiðssetningurin hjá adjunkti umfatar gransking og avmarkaða undirvísingarskyldu umframt tær próvtøkuskyldur, sum hoyra til undirvísingina. Harumframt hevur adjunktur skyldu at taka lut í umsitingini á setrinum.

Adjunktur, sum er í starvi, tá ið hesar reglur koma í gildi, skal eftir ávísa tíðarfreist, sum setrið og adjunkturin áseta í felag, lúka tær treytir, sum krevjast fyri at fáa fast starv sum lektari.

**Granskingarstipendiatstørv** eru 3-ára størv eftir serligum reglum – t.d. fyri ph.d.-lestur, sí kunngerð og reglur fyri hann.

## ONNUR TÍÐARAVMARKAÐ STØRV

**Leysalærarar** eru uttanseturs tímalærarar, sum deildirnar seta eftir serligum sáttmála fyri eina lestrarhálvu í senn.

### Vísindaligur avloysari

Í serligum førum kunnu deildirnar seta vísindastarvsfólk í tíðaravmarkað starv í eitt ár. Deildin, sum varðar av tíðaravmarkaða starvinum, skal fáa til vega prógv fyri at fólkið er skikkað. Biðið

verður um curriculum vitae (yvirlit yvir útbúgving, royndir við størvum, gransking, undirvísing o.ø.t.) yvirlit yvir vísindalig avrik, prentaðar greinir og ritgerðir og avrit av prógvum umframt eina stutta lýsing av granskingarætlanum fyri tíðarskeiðið setanin fevnir um. Heitt verður á vísindafólk á økinum ella fólk við samsvarandi førleika at meta um fakligi og pedagogiski førleikin eru í lagi.

Vísindaligt avloysarastarv umfatar undirvísing og gransking. Deildin ger avtalu við vísindaliga avloysaran og tilskilar lutfallið millum arbeiðsuppgávurnar. Skjalprógv fyri førleikan hjá avloysaranum og avtalan millum deildina og vísindaliga avloysaran verða løgd fyri megindeildarráðið og rektaran til góðkenningar og fyri setursráðið til staðfestingar.

**Uttansetturs lektari** er tíðaravmarkað, fulltíðar- ella parttíðar støða. Uttansetturs lektarar skulu lúka somu krøv sum til regluliga lektarasetan[1]. Uttansetturs lektari verður settur fyri trý ár í senn, setanin kann verða longd, men kann vanliga í mesta lagi vera 10 ár til samans.

**Uttansetturs professari** er tíðaravmarkað, parttíðar støða. Uttansetturs professarar skulu lúka somu krøv sum til regluliga professarasetan.[2] Uttansetturs professari verður settur fyri trý ár í senn, setanin kann verða longd, men kann vanliga í mesta lagi vera 10 ár til samans.

## FØST STØRV

### Lektari

Lektarastørv eru fastar støður.

Tey, sum kunnu fáa lektarastørv, skulu hava førleika, sum samsvarar við hann, sum tað er gjørligt at røkka í adjunktstøðu, t.e. í minsta lagi hava ph.d.-prógv ella samsvarandi førleika og skjalprógva granskingarførleika á altjóða stigi. Lektaraumsøkjarar eiga at hava pedagogiskan førleika og umsitingarligar royndir.

Í metingini eigur fyrst av øllum at verða mett um vísindaliga førleikan. Samstundis eigur dentur at verða lagdur á førleikan at undirvísa.

Arbeiðssetningurin hjá lektara umfatar gransking, menning av fakøki sínum, undirvísing, studenta- og ph.d.-vegleiðing og próvtøkur. Harumframt hevur lektari skyldu til at taka umsiting upp á seg.

---

[1] Tað sum hevur verið kallað "adjungeraður lektari" og "lektari II".
[2] Tað sum hevur verið kallað "adjungeraður professari" og "professar-II".

**Professari**

Professarastørv eru fastar støður.

Professarastørv kunnu tey fáa, sum hava vísindaligan førleika oman fyri lektarastig, og sum hava útint gransking á altjóða stigi. Harafturat skal umsøkjarin duga at skapa menning og framgongd á granskingarøki sínum. Metingin eigur at leggja dent á royndir við granskingarleiðslu, umsiting og á kveikjandi gávur umsøkjarans.

Arbeiðssetningurin hjá professara er umframt gransking, undirvísing og umsiting at síggja til at menna granskingarumhvørvið gjøgnum at leiðbeina studentum og vísindastarvsfólkum.

Setursráðið ger av um professarastøða er reglulig ella persónlig. Regluligar professarastøður verða lýstar sum størv at seta.

Persónlig professaratilnevning umfatar somu skyldur sum reglulig professarstøða. Lektarar á setrinum kunnu biðja um at fáa førleika sín mettan. Verður lektari mettur at hava professaraførleika, fær hann persónligt professaraheiti.

## UTTANSETURS VIRKSEMI

Lektarar og professarar í føstum starvi kunnu umframt fult starv á Fróðskaparsetrinum taka aðrar varandi og fast løntar uppgávur upp á seg við góðkenning frá setursráðnum. Fevna slíkar uppgávur um meira enn 20% av fullum starvi, minkar starvið á setrinum samsvarandi.

## LÝSING FYRI STØRVUM

Øll útbúgvingarstørv og øll føst størv verða alment lýst leys at søkja. Sí annars reglur fyri starvssetan. Tíðaravmarkað størv kunnu verða sett uttan lýsing, um so er at setanin ikki er longri enn eitt ár. Slík tíðaravmarkað og ólýst størv kunnu ikki verða longd. Skal sama fólk halda fram í starvinum, skal tað lýsast leyst at søkja.

SAMTYKT Á SETURSRÁÐSFUNDI 17.6.99